# Gunnleyg leiðari fyri alt eldraøkið

**Í gjár tók Gunnleyg Durhuus við starvinum sum leiðari fyri alt eldraøkið í landinum. Talan er um eitt nýtt starv undir Almanna- og Heilsumálaráðnum.**

STARVSSETAN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Gunnleyg Durhuus hevur seinastu gott og væl seks árini starvast sum trivnaðarstjóri hjá Tórshavnar Kommunu, og í hesum starvi hevur eisini fingið gott innlit í eldraøkið.

### Hevur stóran áhuga fyri økinum

– Eg kenni væl eldraøkið frá mínum arbeiði á býráðnum, har eg havi verið við í sambandi við bygging av eitt nú heimið fyri minnisveik í Vallalíð og Tjarnargarð. Eisini tók Tórshavnar Kommuna sum tann fyrsta í landinum stig til at velja eitt eldraráð, og tí arbeiðinum var eg eisini partur av, sigur Gunnleyg Durhuus.

Hon sigur, at hon í sambandi við hetta arbeiði fekk stóran áhuga fyri eldraøkinum, og tá ið hon so sá starvslýsingina eftir leiðara til alt eldraøkið, helt hon tað verða júst nakað fyri hana.

– Eg hevði góðan hug at royna nakað nýtt, og eg haldi eisini, at tað er serliga spennandi at fara í eitt slíkt starv, tá ið talan er um eitt heilt nýtt starv, sigur Gunnleyg Durhuus.

### Leiðslan er nú fullmannað

Nú Gunnleyg Durhuus er byrjað í nýggja starvinum, er ovasta leiðslan í Heimarøktini og Serforsorgini fullmannað.

Í tíðindaskrivi sigur Mary í Garði, deildarstjóri, at nú verður farið undir miðvíst arbeiði at styrkja stovnin leiðsluliga, og hetta fer at geva betri møguleikar at samskipa og gagnnýta førleikan innan tey økir, ið stovnurin fevnir um.

Heimarøktin og Serforsorgin, sum skjótt fer at fáa nýtt navn og nýggja heimasíðu, umsitur fyri umleið 440 milliónir krónur árliga, og eini 1400 fólk arbeiða undir stovninum.



*Fullmannaða leiðslan í Heimarøktini og Serforsorgini: Sitandi frá vinstru Regin Johansen, leiðari fyri Stuðulsskipanina fyri vaksin og deildina fyri sinnisveik og Jóannes N. Dalsgaard, leiðari fyri Serstovnadeildina. Standandi frá vinstru: Jette Eirikstoft, fyrisitingarleiðari, Mary J. í Garði, stjóri, Gunnleyg Durhuus, leiðari fyri eldraøkið og Bjarta Wilhelm, leiðari fyri Heilsufrøðiskipanina.* *Mynd: Jens Kr. Vang*

# Uppskot um havumhvørvi sent til hoyringar

**Innlendismálaráðið hevur fyri stuttum sent út eitt uppskot til kunngerð um móttøku av burturkasti, oljuleivdum o.t. í havnum til hoyringar.**

HAVUMHVØRVI
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Nú skulu greiðari reglur gerast fyri móttøku av burturkasti, oljuleivdum og líkandi frá skipum, fyri á henda hátt at verja havumhvørvi.* *Tilvildarlig mynd: Jens Kr. Vang*

Uppskotið er gjørt við heimild í løgtingslógini um verju av havumhvørvinum. Innlendismálaráðið sigur, at uppskotið er ein týðandi liður í arbeiðinum at fáa eitt reinari havumhvørvi kring Føroyar og aðrastaðni.

Áseta skyldu at taka móti burturkasti

Kunngerðaruppskoti inniheldur millum annað reglur, ið áseta skylduna hjá havnum at taka ímóti burturkasti, olju og kloakkspillivatni frá skipum og bátum.

Tað er tó ymiskt, hvussu krøvini til móttøkuskipan verða frá havn til havn. Tað veldst um, hvussu javnan tann einstaka havnin tekur móti skipum og bátum. Er talan um eina havn, har skip javnan leggja til bryggju, eru krøvini til móttøkuskipan sjálvsagt strangari, enn tey eru í eini havn, har skip sjáldan leggja til bryggju, stendur í skrivinum, sum er sent saman við kunngerðaruppskotinum til hoyringar.

Eisini fer nýggja kunngerðin at hava við sær, at skip og bátar skulu fáa eina kvittan frá havnini fyri avhendan av ruski og ørðum, og henda kvittan skal verða goymd umborð á skipinum í minsta lagi í 2 ár.

Sambært Innlendismálaráðnum er endamálið við hesi kvittanarskipan lutvíst at lætta um eftirlitið við, at skip veruliga avhenda burturkast, og eisini at gera tað møguligt hjá bæði havnum og myndugleikum at fylgja við, um størri nøgdir verða avhendaðar á landi ella ikki.

Innlendismálaráðið hevur heitt á hoyringspartarnar um at lata ráðnum viðmerkingar til uppskotið í seinasta lagi fríggjadagin 21. apríl.

## Sparikassin aðalfund í komandi viku

Fríggjadagin í komandi viku hevur Føroya Sparikassi árliga aðalfundin hjá sær. Aðalfundurin verður í B36-húsinum í Havn.

Á skránni er millum annað at heimila nevnd Sparikassans at lata peningastovninum at ognast upp til 10 prosent av egnum partabrøvnum fram til næsta ársaðalfund. Eisini skal gerast av, hvussu yvirskoti hjá Sparikassanum skal nýtast.



*Marner Jacobsen, forstjóri í Føroya Sparikassa, hevur ein serstakliga góðan roknskap at leggja fram, tá ið ársaðalfundur Sparikassans verður fríggjadagin í komandi viku.*
*savnsmynd*

Føroya Sparikassi hevði eitt metgott ár í fjør við einum avlopi áðrenn skatt upp á 164,2 milliónir krónur í mun til 111,7 milliónir krónur árið fyri. Talan er um besta úrslitið hjá Spari-kassanum nakrantíð.

Virksemið hjá Føroya Sparikassa er í stórum vøkstri, og í fjør komu umleið ein triðingur av inntøkunum hjá Sparikassanum frá virksemi uttan fyri Føroyar.

**tn**